# Savna inn til nýggjarshald og vælgerðandi endamál í Suðuroy

**Um vikuskiftið verður framsýning av bilum, klæðum frá innast til uttast, umframt hoppiborg, tombola og annað, í ítróttarhøllini á Tvøroyri**

TILTAK
*Áki Bertholdsen*



Hetta vikuskiftið er Ítróttarhøllin á Tvøroyri miðdepilin fyri stórum tiltaki har ymiskt er á skránni, bæði til vaksin og børn

Hetta vikuskiftið verður stórt tiltak í ítróttarhøllini í Trongisvági, har bæði framsýningar av ymsum slagi og onnur tiltøk verða á skránni.

Tað eru gamlaársnevndin á Tvøroyri og og Lions Klubburin í Suðuroy, sum skipa fyri.

Peningurin, sum gamlaársnevndin fær inn, skal brúkast til nýggjarshaldið á Tvøroyri, sum bara veksur og veksur í vavi og peningurin, sum Lions Klubburin savnar inn, verður óskerdur brúktur til ymisk vælgerðandi endamnál í Suðuroynni.

Hesuferð er gjørt av, at peningurin verður latin Suðuroyar Sunnara Bjargingarfelag til at keypa ymsa útgerð fyri.

Í sjálvari ítróttarhøllini verður ein stór framsýning av bilum, har seks av teimum stóru bilasølunum eru við. Bilasølurnar, sum eru við, eru: Nordbil, Bilfríðkan, Berg Motors, Wenzel, Reyni Service og Esmar Simonsen.

Umframt bilarnar, fer Sigma Import at vísa skutarar fram og CN-bygg sum, selur eykalutir til bilar, er eisini við á framsýningini.

### Klæðir frá innast til uttast

Hesuferð eru eisini tvær mótasýningar á skránni, tær verða leygardagin og sunnudagin, báðar dagarnar klokkan 17.

Á framsýningini fer Pau at vísa fram klæði, sum tey sjálvi gera sniðið til, CN Wear, sum hevur mannfólkaklæðir og barnaklæðir, Toystovan, sum hevur klæðir, Alval, sum hevur arbeiðsklæðir og at enda, Reinfan, sum fer at vísa undirklæðir til konufólk fram.

Annars er framsýningin opin fríggjakvøldið frá klokkan 19 til 22, leygardagin frá klokkan 14 til 20 og sunnudagin somuleiðis frá kl. 14 til 20.

Hjá vaksnum kostar 40 krónur at sleppa inn og hjá børnum kostar tað 20 krónur.

### Peningur til bjargingarfelagið

Samstundis sum hetta fer fram í sjálvari ítróttarhøllini, hevur Lions Klubburin í Suðuroy ymisk tiltøk í hølunum við síðurnar av.

Har verður tann vælumtókta hoppiborgin, umframt at onnur tiltøk verða, eitt nú tombola av ymsum slagi, har til ber at vinna mat, kakur, bamsur og annað. Harumframt fara tey at selja ís og popkorn.

Lions Klubburin letur hvørt ár stórar upphæddur til ymisk vælgerðandi og almannagagnlig endamál, mest í Suðuroynni. Og avgjørt er, at peningurin, sum kemur inn hesuferð, skal verður óskerdur latin Suðuroyar Sunnara Bjargingarfelag at keypa ymsa útgerð fyri.

Hetta er triðju ferð, at ætlanin er at skipa fyri hesum tiltakinum. Tvær ferðir mátti tiltakið avlýsast, aðru ferðina tí at verkfall var og aðru ferðina tí Smyril var í dokk so at framsýnararnir ikki fingu bilarnar suður.

# Onkið skeivt í at kanna fosturtøku - journalar

**– Men tað kann bert gerast sum ein granskingarverkætlan við loyvi frá siðsemisnevndini, sigur formaðurin í Læknafelag Føroya**

FOSTURTØKUR
*Áki Bertholdsen*



*– Skulu kanningar gerast, skal peningur játtast til eina granskingarverkætlan og onkur skal finnast, sum er skikkaður at fara undir eina slíka æltlan - og sum hevur hug til tað, sigur Hans Petur Nielsen, formaður í læknafelag Føroya*

– So leingi allar reglar verða hildnar, dugi eg ikki at síggja nakað skeivt í, at journalir hjá kvinnum, sum hava fingið fosturtøku, verða kannaðar.

Hans Petur Nielsen, formaður í Læknafelag Føroya sigur, at tað ber væl til at fáa tilfar til vega, sum lýsir orsøkirnar til, at kvinnur gera av at fáa fosturtøku.

Tað vakti annars ans, tá ið ný-tilnevndi Landsstýrismaðurin hjá miðflokkinum, Bill Justinussen, segði í Útvarpinum, hann hevði sett sær fyri at lýsa orsøkirnar til, at kvinnur gjørdu av at fáa fosturtøku.

Hann helt, at hetta tilfarið kundi útvegast við at kanna sjúkrahús-journalir hjá føroyskum kvinnum, sum høvdu fingið fosturtøku.

Síðani hevur verið frammi, at hetta ber ikki til, tí journalir verða skrivaðar og goymdar í størsta trúnaði og tey, sum handfara tær, hava tagnarskyldu.

Men formaðurin í Læknafelag Føroya dugir ikki at síggja nakað løgið í hesum.

– Men tað er sjálvandi greitt, at ein slík kanning, er hvørki ein umsitingarlig, ella ein politisk kanning.

Hann sigur, at hann ivast ikki í, at Bill Justinussen ikki ætlar at tað skulu vera onkir politikarar, ella fólk í umsitingini hjá Trivnaðarmálaráðnum, sum skulu kanna hesar journalirnar.

– Tað kann tað sjálvsagt ikki vera talan um, tí ein slík kanning kann einans gerast sum eitt lið í eini læknafrøðiligari granskingarætlan, sigur hann.

Hann sigur, at fyri at fara í holt við eina slíka ætlan, krevst loyvi frá siðseminevndini, har ætlanin og endamálið við kanningini verður lýst út í æsir, áðrenn loyvi verður givið og har navnloysið hjá kvinnunum verður tryggjað.

Hann leggur afturat, at skal ein slík gransking gerast, skal peningur játtast til verkætlanina og onkur skal finnast, sum er skikkaður at fara undir eina slíka æltlan – og sum hevur hug til tað.

### Heilt vanligt

Hans Petur Nielsen sigur, at tað er als ikki óvanligt, at kanningar, sum lýsa, hvussu sosialar umstøður ávirka gynekologisk (um kvinnusjúkur sum heild) og obstretisk (um føðingar) viðurskifti, verða gjørdar í londunum rundanum okkum, sum vit plaga at samanbera okkum við.

Hann sigur, at øll lond royna at avmarka talið á fosturtøkum og í tí sambandi eru líknandi kanningar gjørdar í ymsum londum.

Men hann vísir samstundis á, at í royndun um at fáa talið á fosturtøkum niður, verður størsti denturin tó lagdur á fyribyrging og upplýsing.

Og hann leggur eisini dent á, at í hinum norðanlondunum verður rætturin hjá kvinnuni frítt at velja um hon vil hava forsturtøku, ella ikki, mettur sum ein heilt grundleggjandi rættur og tí er frí fosturtøka í londunum rundanum okkum, hóast roynt verður at avmarkað talið við fyribyrging og upplýsing.

# Fólkið skal velja

**– Skal spurningurin um fullveldið til fólkaatkvøðu til fólkaatkvøðu, skulu politikararnir ikki longu frammanundan taka støðu fyri fólk, heldur sjálvstýrismaðurin, Kári Højgaard**



*Hvussu barnið eitur hevur ikki so stóran týdning fyri Kára Højgaard, sum vit av misgáum gjørdi til formann sjálvstýrisfloksins í Sosialinum í gjár*

RÍKISRÆTTARLIGA STØÐAN
*Áki Bertholdsen*

– Um vit eru innanfyri ella uttanfyri, er ikki tað, sum hevur størstan týudning fyri meg

Kári Højgaard, tingmaður fyri sjálvstýrisflokkin, er ikki tann, ið vil taka beinleiðis støðu til, hvussu Føroyar skulu skipast í ríkisfelagsskapinum við Danmark, ella um vit skulu vera uttanfyri.

Í grein í gjár komu vit av misgáum at gera hann til formann sjálvstýrisfloksins, men tað er hann ikki, tí formaður floksins er Eyðun Elttør, landsstýrismaður.

Men Kári Højgaard er einasti tingmaður sjálvstýrisfloksins, men nakra beinleiðis støðu til sjálvan ríkisfelagsskapin hevur hann ikki.

Tað, sum hann heldur hevur størstan týdning, er at vit skipa so fyri, at Føroyar verða fíggjarliga óheftar av dønum.

Tá ið vit eru komin hartil, er spurningurin um framhaldandi støðuna í ríkisfelagsskapinum ein spurningur, sum fólkið eigur at avgera á eini fólkaatkvøðu.

– Um vit so kalla tað samríki, kongsfelagsskap, ella um vit skulu standa uttanfyri rtíkið, hevur ikki tann avgerandi týdningin, bara vit eru fíggjarliga óheft og at fólkið sleppur at taka støðu, uttan at hugsa um fíggjarligar bindingar.

Men hansara persónligu meting, sleppur hann sær elegant undan at svara beinleiðis uppá.

– Tá ið vit siga, at fólki skal taka støðu á fólkaatkvøðui, haldi eg ikki ,at vit politikarar longu frammanundan skulu taka støðu fyri tey, sigur Kári Højgaard.



# So stóð Gøtuvík fyri tørni



*Í Bretlandi fóru bóndagarðar – ella lívsverk – uppí royk av munn-og kleyvsóttini. Nú er líkt til, at ILA-sjúkan fer at raka flestu alibrúk í landinum.*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

ILA-SJÚKAN
*Vilmund Jacobsen*

Í Sosialinum í gjár segði stjórin í partafelagnum, Luna, sum hevur alibrúk á Gøtuvík, at sterkur illgruni er um, at alibrúkið hjá teimum er rakt av herviligu ILA-sjúkuni.

Atli upplýsti, at Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevur tikið royndir í ringunum, men at úrslitið ikki var greitt, tá ið blaðið tosaði við hann.

Stjórin í Luna væntar annars tey ringastu boðini, nevniliga at ILA-sjúkan nú eisini verður staðfest á Gøtuvík.

Á Lambavík er smittan staðfest fyri fleiri mánaðum síðan, og hugsandi er, at hon er borin hiðani.

Sosialurin royndi at fáa fatur á Atla Gregersen í gjár, men hann var á fundi.

Vit høvdu bróðurin, Páll Gregersen, í telefonini, men hann helt tað ikki vera rætt at úttala seg, tá ið Atli hevur ábyrgdina av alingini.

Tó skiltist á Pálli, at lítil og eingin ivi er um, at ILA-sjúkan nú eisini er komin á Gøtuvík og hevur rakt alibrúkið hjá Luna.

### Kenslur og taknar

Tá ið munn-og kleyvsóttin herjaði í Bretlandi, var nógv frammi um, hvussu sjúkan rakti heilar bóndagarðar og familjur. Garðar, sum familjur høvdu bygt upp gjøgnum mong ár, endaðu í royki, tá ið øll kríatúrini vórðu brend á stórum báli, sum logaði í fleiri dagar. Eitt lívsverk fór upp í royk. Onkur hundur og kanska okkurt annað tvíføtt kríatúr gekk eftir á garðinum, tá ið menn komu at sóttreinsa bygningar og amboð. Ein syndarlig sjón.

So galið er nú ikki við føroysku alivinnuni, hóast hon hevur fingið ILA-sjúkuna at dragast við, men løgið skal tað vera, um kenslurnar ikki líkjast teimum hjá bretsku bøndrunum.

Vit fara í einum seinni blaði at tosa við alarar um hesa herviligu sjúku, sum nú sær út til at fara at raka flestu alibrúk í landinum.

# Fríøki og spælipláss Undir Nesinum

UMHVØRVI
*Vilmund Jacobsen*

Í kvøld verður fundur á Svangaskarði á Toftum, har borgarar, sum búgva Undir Nesinum í Nes kommunu, fáa høvi at røða um, hvørt áhugi er fyri at gera eitt kombinerað fríøki og spælipláss Undir Nesinum.

- Er áhugi fyri hesum, er ætlanin at velja eina nevnd, sum skal standa fyri arbeiðinum á økinum. Nevndin skal síðan skipa arbeiðsbólkar og eitt nú samskifta við kommununa um tey praktisku viðurskiftini í samband við tað, sum gerast skal, siga teir tríggir, Ingemar Højgaard, Jóhannus Danielsen og Jóan Símun Saltá, sum búgva Undir Nesinum.

Tað var Nes kommuna, sum bjóðaði nøkrum fólkum til kunnandi fund á kommunuskrivstovuni. Kommunan vildi hava at vita, um áhugi er millum borgararnar, sum búgva har inni í kommununi, at gera eitt kombinerað fríøki og spælipláss.

### Kommunan rindar

Sum skilst, er ætlanin hjá Nes kommunu at lata økið, sum er niðanfyri húsini hjá Jóhannusi Olsen og Jóannesi Hansen, til endamálið. Eisini er kommunan sinnað at gjalda kostnaðin av tilfarinum, sum nýtast skal. Hetta er tó treytað av, at borgararnir, sum búgva Undir Nesinum, vilja gera arbeiði ókeypis.

Teir tríggir, Ingemar, Jóhannus og Jóan Símun, vórðu á kunnandi fundinum við kommununa, valdir í eina fyribils nevnd, sum nú skipar fyri fundinum, ið verður á Svangaskarði.

Nevndin hevur síðan vent sær til Regin Debes og hevur fingið hann at gera eina fyribils skitsu av økinum.

Stigtakararnir til fundin í kvøld vóna, at fólk, sum búgva Undir Nesinum, møta fjølment.

Fundurin á Svangaskarði verður kl. 21.